# Lítil sagimaskina sparir nógvan pening

**– Spard tíð er spardur peningur, sigur Ronald Poulsen. Á messuni í Danmark fekk hann fatur á eini lítlari, men kortini hentari sagimaskinu**

BYGGERI 2006
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*


*Ronald Poulsen og sonurin Bjarni eygleiða hesa nýggjastu sagimaskinuna hjá Tórshavnar kommunu. Ronald fór glaður aftur til húsa!*

**Saging:** Hann er ungur í sinni, og er ikki bangin fyri at leita eftir tí nýggjasta nýggja og tí besta.

Millum luttakararnar á Byggeri 2006 var Ronald Poulsen, starvsmaður á Veg- og Kloakkdeildini hjá Tórshavnar Kommunu.

Í arbeiði sínum kunnu teir koma út fyri, at neyðugt er at saga rør sundur ella teir mugu inn um eitt fundament fyri at loysa ein trupulleika.

Hetta er ikki altíð eins lætt, tí illa er sleppandi til við teimum vanligu sagimaskinunum.

Men her á byggimessuni fann hann eina maskinu, sum kann verða til stóran fyrimun og lætta í arbeiði teirra.

Ronald sá hana, kannaði hana og keypti hana eisini.

– Og nú gleði eg meg bara til hon verður tikin í brúk her hjá okkum, sigur tann altíð so fryntligi Ronald Poulsen.

### Lættir um

Henda nýggja maskinan, sum bæði er lítil og lætt, skal nýtast til betong-saging. Hon kann sum einki saga 30 cm. inn í ein múr.

– Fyrimunurin við henni er, at hon sagar líka skjótt inn í ein betongmúr sum hon sagar gjøgnum træ, greiðir Ronald frá.

Henda serstaka maskinan er ein ketusag, og tað gevur henni uppaftur aðrar fyrimunir.

Brúkar ein tær vanligu rundsagirnar at saga við, verða sárini ofta rættiliga stór. Tað sleppur ein nærum undan við hesari.

– Haraftrat er støðan eisini hon, at tað er ikki allastaðni at vit kunnu sleppa runt um at saga. Nú kunnu vit klára alt frá bert einari síðu, sigur Ronald.

### Kloakkir

Sum starvsmaður á Veg- og kloakkdeildini í Havn sær hann nógvar eyðsýndar fyrimunir við hesi nýggju ketusagini.

Ein partur av arbeiðinum á hesi deildini er at arbeiða við teimum mongu kloakkleiðingunum í høvuðsstaðnum.

Skulu teir annaðhvørt saga eitt betongrør sundur, ein brunn ella talan er um eitt fundament fyri at koma inn í eini hús, sleppur ein ikki altíð eins væl framat við eini rundsag bara frá einari síðu.

Ein fyrimunur aftrat við hesi nýggju sagini er, at hon er løtt og vigar ikki meiri enn eini seks kilo.

Tað krevst eitt anlegg at dríva hana, og hetta anleggið til oljutrýst eigur kommunan eisini.

### Sparir tíð

Undan hesi stóru byggimessuni var Ronald kunnaður um, at ein slík sag var at finna her.

Tað gekk heldur ikki long tíð, til hann hevði funnið básin har henda maskinan var at fáa til keyps. Og maskinan varð eisini keypt!

– Fyri meg er eingin ivi um, at henda maskinan fer at spara seg innaftur rættiliga skjótt í tíð.

– Og ikki tær at siga, so er tíð eisini peningurin, sigur Ronald við einum brosi.

## Smáar fyritøkur eru sera sunnar

**Arbeiðsdygd:** Ein nýggj kanning frá danska Heilsustýrinum vísir, at størri fyritøkur við fleiri enn 100 starvsfólkum, gera nógv meiri fyri heilsuna hjá starvsfólkunum enn tær smærru fyritøkurnar.

Men fólk innan DS Håndværk og Industri koma nú við atfinningum móti teimum almennu myndugleikunum fyri at gera ov skjótar og haraftrat skeivar niðurstøður út frá kanningini.

– Tað er hóast alt meiri sunt fyri likam og sál at hava eitt virkið arbeiði sum handverkari, enn at sita stillur á einum stóli allan dagin á eini stórari skrivstovu.

– So tað er greitt, at starvsfólkini gerast sjúk, sigur Poul Bavngaard, sum er kunningarstjóri í DS.

Heilsustýrið er ikki einasti myndugleikin, sum DS Handverk og Ídnað koma við viðmerkingum til, tá talan er um heilsu og trivnað hjá starvsfólkunum.

– Arbeiðseftirlitið kemur við áheitanum til ein hóp av okkara fyritøkum um at fáa motiónsrúm til starvsfólkini. Vit vóru øll somul um at doyggja í látri, tá vit hoyrdu tað!

– Nógv av okkara fólkum hava ein yvirarm sum er størri enn miðjan í Arbeiðseftirlitinum, tí tey lyfta tungt jarn allan dagin. So motiónsrúm er helst ikki tann størsti tørvurin beint nú, sigur Poul Bavngaard.

Hann er nú farin at vita, um hann ikki finnur eina kanning, sum greitt sigur, at smærri fyritøkur eru sera sunnar.

– Ein kannar jú bæði eitt og annað í dag. So eg skal nokk finna eina slíka frágreiðing onkustaðni, sigur hann.

Tá hann finnur hana, lovar hann at úrslitið skal verða væl og virðiliga kunngjørt fyri almenningin.

## Læra, men skifta síðani bransju

**Útbúgving:** Fleiri aðrar bransjur fáa fyrimun av útbúgvingunum innan byggi- og anleggsarbeiðini.

Í løtuni eru fleiri enn 60.000 ung í gongd við eina vinnuútbúgving. Hóast byggi- og anleggsvinnan bert telur 7 % av samlaðu arbeiðsmegini í Danmark, hava 17.000 teirra valt eina útbúgving innan júst hesa vinnuna. Frá november 2004 til november 2005 hækkaði talið av praktikkavtalum í byggi- og anleggsvinnuni við 24 %.

Ein kanning, sum Danmarks Statistik hevur gjørt fyri tíðarritið hjá Dansk Byggeri "Barometer" vísir, at helvtin av teimum sum eru útbúgvin innan byggi- og anleggsarbeiði arbeiða innan aðrar vinnur.

– Umleið 15 % arbeiða í ídnaðinum, 12 % hava funnið arbeiði innan tað almenna, og restin er javnt býtt millum aðrar vinnugreinar.

– Hetta merkir at stórur eftirspurningur er eftir hesum fólkunum, sum ein fær úr byggi- og anleggsvinnuni, sigur Louise Pihl frá Dansk Byggeri.

## Færri arbeiðsleys í Keypmannahavn

**Arbeiði:** Talið av arbeiðsleysum og aktiveraðum er minkað við 14,3 % frá desember 2004 til desember 2005.

Íalt eru 36.400 persónar í Keypmannahavn arbeiðsleysir og væntað verður, at talið fer at minka enn meiri.

## Heiðursløn fyri góð hugskot

**Kapping:** Boligejernes Videncenter Bolius hevur sett í gongd ta størstu og mest ambitiøsu bústaðarkappingina nakrantíð.

Einastu treytirnar fyri at luttaka í kappingini er, at ein býr í einum húsi og hevur eitt gott hugskot, sum ein vil geva Bolius lut í.

Heiðurslønir í kappingini eru íalt uppá 1,4 mió. kr.